# Drepara-alligator skotin



Ein fimm metrar langur alligator, sum fyri fáum døgum síðani drap og át eina 11 ára gamla gentu er nú skotin og dripin. Hann hevði framvegis restir av gentuni í kjaftinum. Alligatorurin leyp á 11 ára gomlu gentuna, tá hon sunnudagin baðaði saman við nøkrum vinfólkum í einum áarósa við býin Guajará-Mirim í norðrara parti av Brasilien. 16 ára gamli bróður gentuna kundi bara síggja hjálparleysur at, meðan lítlasystir varð drigin undir vatnið av 350 kilo tunga alligatorinum. Eitt bjargingarlið fann seinni dýrið, sum varð skotið og dripið, skrivar ekstrabladet.dk.

# Havanissa afturkomin

Fyri 13 árum síðani hvarv ein havanissa sporleyst frá havanum hjá Doris og Denis Heards í Leeds. Parið fekk eitt postkort frá horvnu nissuni, sum eftir øllum at døma var í Devon, men síðani hevur einki verið at frætt um keramiska dvørgin. Til nú. Eftir 13 ára samvitskukvalum hevur tjóvurin nú sent parinum eina nýggja havanissu og eitt bræv við einari umbering. »Eftir at eg eri vorðin vaksin og havi fingið mín egna hava, plágar samvitskan meg illa um, at eg havi stolið frá tykkum og tykkara hava. Vónandi taka tit ímóti mínari umbering og hesari nýggju havanissuni«, skrivaði tjóvurin. 78-ára gamli Denis Heard hevur nú takkað samvitskufulla tjóvinum í The Yorkshire Evening Post, skrivar DR á heimasíðu síni.

# ni gerast leguhús hjá børnum

**Stórarbeiði**

Páll Poulsen, ið er kendur innan brøðrasamkomuna í Føroyum, er ein av monnunum aftanfyri Kaamasoq.

Hann sigur, at teir í fjør summar tóku hesar tríggjar bygningarnar í Føroyingahavnini niður og fluttu alt tilfarið við skipi hjá Sandgrevstri í Fuglafirði til eitt pláss í Suðurgrønlandi, tætt uppat niðurlagda bóndagarðinum.

- Hetta var eitt rættiliga stórt arbeiði, tí alt mátti takast niður og flytast við handamegi. Við staðið, har leguhúsið skal byggjast, er heldur eingin bryggja, og haðani mátti alt tilfarið eisini flytast niðan á økið, har tilfarið nú liggur.

Páll sigur, at tað tók góðar tríggjar vikur at taka húsini niður og flyta tey.

- Í byrjanini var eg einsamallur, men síðan vóru vit fleiri, sum vóru saman um hetta stórarbeiði, leggur hann aftrat.

*”... eg vildi ynskt, at vit sótu við byggiloyvinum nú, so vit kundu farið í gongd...*
*(Páll Poulsen)*

**30 børn á legu**

Niðurtiknu bygningarnir í Føroyingahavnini skulu reisast uppaftur og verða karmur um leguhús hjá børnum í Grønlandi og starvsfólkahús hjá teimum, sum hjálpa til á barnalegunum.

Páll Poulsen sigur, at nýggja leguhúsið verður einar 300 fermetrar stórt og fer at kunna taka ímóti 30 børnum í senn. Starvsfólkahúsið verður góðar 100 fermetrar stórt og kemur at hava 8 kømur.

- Samkoman hevur eisini skip í Grønlandi, sum koma at flyta børnini til og heimaftur av legunum, leggur hann aftrat.

Tekningar eru gjørdar av verkætlanini, og nú bíðar grunnurin eftir, at øll loyvi skulu koma upp á pláss.

- Tey, sum áttu garðin og sita á lendinum á leiðini, hava einki ímóti, at leguøkið verður bygt. Ætlanin verður soleiðis framd í samráð við tey, eins og kommunalu myndugleikarnir hava góðkent byggiætlanina.

Páll Poulsen sigur, at enn bíða tey eftir grønlendska heimastýrinum um ”arealtildeling”, sum tað verður rópt, og fyrr enn hesi viðurskifti eru greið, er byggiloyvið ikki tøkt.

- Eg vildi ynskt, at vit sótu við byggiloyvinum nú, so vit kundu farið í gongd, sigur hann.

**Næsta summar**

Páll Poulsen væntar, at um endaligu loyvini ikki fara at draga alt ov langt út, fer nýggja leguhúsið og starvsfólkahúsið í Grønlandi at standa uppi, soleiðis at tey kunnu byrja barnalegurnar í nýggja umhvørvinum á sumri næsta ár.



*Gongst, sum ætlað, fara tríggir av bygningunum, sum hava staðið í Føroyingahavnini, at koma børnum í Grønlandi til góðar sum leguhús*

Nærmasti býurin til føroyska leguøkið í Suðurgrønlandi er Julianneháb, sum liggur einar 12-15 sjómíl haðani.

Tað eru umleið 35 ár, síðan brøðrasamkoman í Føroyum av fyrsta tíð fór undir at skipa fyri barnalegum í Grønlandi.

Páll Poulsen sigur, at tá brøðrasamkoman í sínari tíð byrjaði við barnalegum í Grønlandi, vóru eisini eini gomul hús tikin niður í gomlu Føroyingahavnini og bygd uppaftur til leguhús.

- Veðurlagið í Grønlandi er soleiðis háttað, at timbur heldur sær leingi. Tað er turt og kalt stóran part av árinum, og tí kann nógv av hesum tilfari brúkast aftur, sigur hann.

Hesi trý húsini, sum nú eru tikin niður í Føroyingahavnini, eru upprunaliga norsk elementhús, sum norðmenn í sínari tíð bygdu har yviri.

# At børn sita óbundin gevur klipp í koyrikortið

**- Nógv færri koyra í trygdarbelti í vanligari býarkoyring í Havn, enn tey gera á longri teinunum millum bygdir, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn**

KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin týsdagin gjørdi løgreglan grein 13 kanning í Havn.

Umleið 100 bilar vóru steðgaðir og kannaðir, harav løgreglan skrivaði 67 frágreiðingar, sum allar í minsta lagi geva 500 krónur í bót.

Millum brotini gav løgreglan trý klipp í koyrikortið, tí børn ikki sótu í trygdarbelti.

Tilsamans 49 frágreiðingar vórðu skrivaðar um bilførarar og onnur í bilinum, sum ikki sótu í trygdarbelti, 11 førarar tosaðu í fartelefon, tríggir høvdu einki koyrikort uppi á sær, og í einstøkum føri vóru dekk og lyktir ikki í lagi.

Umframt hesar 67 frágreiðingarnar og soleiðis eisini brot á ferðslureglurnar, gav løgrelan 11 átalur fyri ymisk smærri brot.

Í stuttari viðmerking, sigur vakthavandi á politistøðini, at nógv færri koyra í trygdarbelti í vanligari býarkoyring, enn tey gera á longri teinunum millum bygdir.




*Løgreglan ”fangaði” nógvar bilførarar á skeiva beininum í Havn í gjár, tá hon gjørdi grein 13 kanningar*